

...n uppgáva at loysa teir trupulleikar, sum fara at standast av øktu ferðsluni, men vit vilja fegin viðvirka til,

Mynd: Vilmund Jacobsen

# ...ólukkuligari støðu

kommunu hevur lagt upp til, at Teknistovan í Gøtu hyggur nærri at hesi ætlanini.

Tá ið úrslitið liggur á borðinum við endan av desember, kann farast víðari í málinum.

### Mong uppskot

Eini níggju ymisk uppskot hava verið frammi um loysn av ferðslutrupulleikunum í Leirvík, og leggjast kann aftrat, at uppskotið, sum meirilutin í bygdarráðnum hevur samtykt um vega- og tunnilsloysn, er ikki fallið í góða jørð hjá eitt nú virkinum, Tavuni, har leiðslan í brævi hevur heitt á Vinnumálaráðið og Leirvíkar kommunu um ikki at fremja hesa ætlan, men heldur fara niðan av havnalagnum við verkætlanini.

Virkið metir nevniliga, at tað fer at órógva umstøðurnar á havnalagnum, um ferðslan til og úr Norðoyatunlinum verður løgd so niðarliga í bygdini.

Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík, váttar, at leiðslan í Tavuni hevur sent avrit av brævi til Vinnumálaráðið til kommununa, og bygdarráðið fer at viðgera brævið næst komandi fundi.

Hon vísir á, at við ætlanini, sum meirilutin hevur samtykt, slepst ikki undan, at nøkur neyst í fyrsti syfti rúka, bæði á Toftanesi og Úti í Støð.

- Men vit ætla kortini ikki, at fólk skulu missa síni neyst og ikki fáa ný ggj neyst aftur, sigur hon.

Fríðgerð sigur, at ætlanin sjálvsagt er at byggja neystini uppaftur aðrastaðni.

### Streingja á

Borgarstjórin sigur, at hóast bygdarráðið ikki er samt um, hvør fyrsta prioritering av eini loysn eigur at verða, so er bygdarráðið kortini samt um, at nakað ítøkiligt skal henda, áðrenn Norðoyatunnilin letur upp fyri almennari ferðslu.

- Vit vildu fegin kunnað glett okkum um hesa n‡ggju farleið, men soleiðis sum landið liggur, nú eingin loysn er á borðinum, ríður hetta mál okkum sum ein marra.

Fríðgerð sigur, at kommunan eigur vegin, sum ferðslan til og úr Norðoyatunlinum fyribils kemur at koyra eftir, og saman við bygdarráðnum ætlar hon avgjørt ikki, at ferðslan kemur at koyra gjøgnum Leirvíkarbygd – uttan so, at ein ítøkilig loysn liggur á borðinum fyri ta tíð.

- Vit eru øll samd um, at vit vilja hava eina skjóta loysn – eina loysn, sum vit øll her í bygdini kunnu liva við, sigur borgarstjórin.

### Tryggja borgararnar

Hon sigur, at bygdarráðið vil tryggja sínar borgarar, bæði tey sum ganga og tey, sum koyra.

- Vit vilja syrgja fyri, at tað verður trygt at ferðast í Leirvíkar bygd, tá ið tunnilin letur upp. Tað er ein almenn uppgáva at loysa teir trupulleikar, sum fara at standast av øktu ferðsluni, men vit vilja fegin viðvirka til, at skilagóðar og skjótar loysnir verða funnar.

Borgarstjórin, sum tók sætð eftir, at Dánjal Andrasen tók seg aftur, leggur dent á, at ein loysn skal liggja á borðinum, áðrenn vegurin gjøgnum Leirvíksbygd verður latin upp fyri almennari ferðslu til og úr Norðoyatunlinum.

- Einki annað kann góðtakast, leggur Fríðgerð Heinesen aftrat.

# Kjartan hevur keypt Fríðborg



*Her liggja bátarnir, Fríðborg og Norðleivur – júst komnir úr Íslandi sum nýbygningar. Nú eigur Kjartan Joensen báðar bátarnar*

**Trolbáturin, Fríðborg, sum Osmundur Justinussen læt byggja í Íslandi, kallast nú Birtingur og hevur fingið nýggjan eigara**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

P/F Hvilvtenni, sum Kjartan Joensen í Leirvík eigur, hevur nú keypt trolbátin, Fríðborg, sum Osmundur Justinussen og synirnir áttu.

Báturin er av sama slagi sum Norðleivur, ið Kjartan frammanundan eigur.

Hesi bæði førini eru bygd í Íslandi og komu til Leirvíkar sama dag.

Fríðborg hevur eisini skift navn og eitur nú Birtingur.



*Fríðborg og Kjartan og Osmundur heilsast í regninum á bryggjuni í Leirvík, tá ið Polarhav og Stjørnan komu*

Mynd: Vilmund Jacobsen

### Eingin prísur

Kjartan Joensen sigur, at yvirtøkudagurin var 7. november, men hann vil ikki upplýsa, hvussu nógv hann hevur keypt trolbátin fyri.

Bátarnir kostaðu einar 7-8 miljónir krónur at byggja.

Hann sigur, at tað hevur gingið hampiliga væl hjá Norðleivi, og tað er serliga landleiðin um sumrarnar, sum roynist væl hjá hesum bátum.

Fríðborg hevur ligið, síðan trolbátarnir góvust á landleiðini, 1. september.

### Rigga til

- Nú gera vit klárt at loysa aftur, og eg vænti, at Birtingur verður klárur at fara aftur til fiskiskap, tá ið hendan vikan er farin at halla, sigur Kjartan.

Vit spurdu eisini, um hann hevur hugsað sær at lata skipini partrola, nú oljan er so dýr, og bátarnir í vetrarhálvuni noyðast at fiska uttanfyri innaru landleiðina, men hetta hevur Kjartan ikki hug at gera nakrar viðmerkingar til í løtuni.

- Nei, tað kann eg einki siga um sum er, sigur hann.

### Manningin

Kjartan Joensen sigur, at hann hevur boðið manningini, sum var umborð á Fríðborg, um at vera verandi umborð, nú loyst verður aftur um nakrar dagar.

Við í keypinum hjá P/F Hvilvtenni fylgja eisini tey veiðirættindi, sum Fríðborg hevði.